## Nú kemur fótbóltsvøllurin

**Haldórsvík:** Avgerðin, sum Sunda kommuna tók mánakvøldið, fer at koma væl við hjá teimum víkafólkum, sum dáma væl at sparka.

Til fundin í bygdaráðnum lógu umsóknir frá íalt fýra av bygdunum um smærri fótbóltsvallir – úr Haldórsvík, Hósvík, Norðskála og á Oyri. Men í hesum umfarinum verður kortini bert gjørdur vøllurin í Haldórsvík.

Kommunan hevur fingið játtað stuðul til ein slíkan vøll, men einki øki er gjørt klárt til at hava vøllin á.

Trivnaðarnevndin í Sunda kommunu mælti bygdaráðnum til at gera ein vøll í Haldórsvík. Hetta kom av, at frástøðan til tann nærmasta vøllin í kommununi er stórt, eins og tann veruleika, at ferðasambandið er truplt.

Bygdaráðið skuldi tí atkvøða um, at hesin vøllurin verður gjørdur í Haldórsvík, og at teknsiska nevndin skal fara undir at gera økið klárt.

Og hetta samtykti so bygdaráðið, og tí kunnu tey í Haldórsvík so smátt fara at gleða seg til ein fótbóltsvøll í bygdini.

**sb.**



*Tey fótbóltshugaðu í Haldórsvík kunnu nú síggja fram til ein fótbóltsvøll í bygdini*

## Mest ferðsla í juni

**Klaksvík:** Juni mánaður er tann mánaðurin har flestu bilarnir koyra eftir tunnilsvegnum á Borðoynni.

Eitt yvirlit hjá Landsverki yvir ferðsluna á føroysku vegunum í 2004 vísir, at í juni mánaði koyra væl omanfyri 2600 bilar hvønn einasta dag eftir hesum vegastrekkinum norðanfyri Klaksvík.

Ikki óvæntað er minsta ferðslan í januar mánaði, tá bert 2000 bilar um dagin koyrdu hetta strekkið. Í miðal koyra 2.453 bilar her hvønn dag í árinum.

**sb.**

## Stuðul til country-festival

**Vestmanna:** Sum kunnugt ætlar Vestmanna Talvfelag sær at skipa fyri stórum countryfestivali í bygdini 16. til 18. september.

Eitt slíkt tiltak kostar sjálvandi pening, og tí vendi felagið sær til kommununa um stuðul til tiltakið. Í fyrstu syftu við ynski um at leiga ítróttarhøllina ókeypis og í øðrum lagi at brúka økið innanfyri brandstøðina til campingvognar og aðrar fasilitetir.

Bygdaráðið her til, at stuðla tiltakinum við 5.000 kr., eins og loyvi var givið fyrireikarunum at nýta ítróttarhøllina ókeypis.

**sb.**

# - Ongatíð gott tá barnatalið minkar

**- Skal eini bygd verða lív lagað, so er neyðugt hjá kommununi at skapa forteytir fyri at ungfólk fáa grundøki og børnini sleppa í barnaansing, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri.**

SKÚLABØRN
*Snorri Brend*



*Hóast skúlabarnatalið í Porkeri er minkandi, so ber borgarstjórin og lærarin, Eli Frederiksen (innfelt) ikki ótta fyri at skúlin fer at lata aftur*

**Porkeri:** Við bert einum einstøkum nemingi í 1. flokki hetta skúlaárið, er næmingatalið ikki av tí mesta við Porkeris skúla.

– Nei, støðan er alt annað enn góð, viðgongur lærarin og borgarstjórin, Eli Frederiksen.

Í skúlanum eru nú 29 næmingar í 1. til 7. flokk. Eftir hetta fara teir í framhaldsdeildina í Vági.

Onkutíð vóru munandi fleiri næmingar í Porkeri, men nú er talið altso komið heilt niður á 29 hetta skúlaárið.

– Tað er ongatíð gott, tá barnatalið minkar soleiðis. Men vit hava kortini ikki mist vónina enn, tí her í bygdini eru væl av børnum undir skúlaaldur, sigur hann.

### Sárbæri

Suðuroyggin hevur víst seg at vera serliga sárbar mótvegis búskaparligu støðuni í samfelagnum.

Við minkandi arbeiði í oynni hevur tað víst seg at vera trupult at fáa ungfólk at støðast, serliga tað unga fólkið. Og vilja tey ikki seta búgv í oynni, so kemur tað at ávirka fólkatalið tann skeiva vegin.

Hinvegin so hava fólk í oynni, og her eisini porkeningar, kortini góðar vónir fyri framtíðina, nú tað umsíðir røkist fyri at eitt Ellis- og røktarheim verður bygt í sunnaru helvt av oynni.

– Tá eitt slíkt heim kemur, so verður sjálvandi tørvur á starvsfólkum til tey ymsu økini á einum slíkum staði.

– Og her vóna vit, at fleiri ungfólk fara at búseta seg í sunnaru helvt av oynni, og sjálvandi eisini her í Porkeri, sigur Eli Frederiksen.

### Treytir

Eli Frederiksen vísir á, at hetta við búsetingina setir krøv til tær einstøku kommunurnar, eisini hana sum hann er borgarstjóri fyri.

Ein fyritreyt fyri øktum íbúgvaratali er í fyrstu syftu hon, at grundøki eru at fáa og at dagrøktin er væl útbygd.

Og hesar báðar fortreytirnar finnast sum er í bygdini: Dagrøktin er væl fyri, og kommunan sjálv hevur einstøk grundøki tøk, eins og møguleiki er at keypa øki frá privatfólki.

Hann óttast tí ikki fyri, at skúlin í Porkeri verður afturlætin eins og tann á Leiti, har eingin næmingur er longur.

– Vit hava fleiri børn undir skúlaaldur, og tí síggja vit framvegis ljóst uppá framtíðina, sigur borgarstjórin.

**FAKTA**

**Næmingar í Porkeri**

| | |
|---|---|
| 1. flokkur: 1 næmingur | 2. flokkur: 6 næmingar |
| 3. flokkur: 5 næmingar | 4. flokkur: 5 næmingar |
| 5. flokkur: 5 næmingar | 6. flokkur: 4 næmingar |
| 7. flokkur: 3 næmingar | |

*(Kelda: Landsskúlafyrisitingin)*

# Øll hava rætt at samskifta

**Stór norðurlendsk ráðstevna setir fokus á týdningin av málinum hjá børnum. Gestir úr grannatjóðum okkara verða við, m.a. Britt Hildeng sum situr í norska stórtinginum og er limur í almannanevndini, umframt ein hópur av fakfólkum, sum arbeiða við málmenningini hjá teimum deyvu**

RÁÐSTEVNA
*Snorri Brend*

**Havn:** – Hvussu verður barnið ment kensluliga og intellektuelt gjøgnum málið?

Hetta er evnið á eini ráðstevnu sum verður hildin á Hotel Føroyum teir komandi dagarnar. Hetta er ein stevna við luttakarum úr øllum Norðurlondum.

Orsøkin til hetta er, at henda ráðstevnan júst verður skipað sum ein partur av tí samstarvinum, sum longu er millum Norðurlond á hesum øki.

Ein líknandi ráðstevna sum henda varð hildin fyri tveimum árum síðani í Noregi, og er nú túrurin komin til Føroyar. Ætlanin er at skipa hesa ráðstevnuna annaðhvørt ár.

### Felags áhugamál

Á ráðstevnuni í ár fáa luttakararnir atongd til nógvar áhugaverdar fyrilestrar, eins og góð høvi eru til prát og tjak um felags áhugamál millum luttakararnar.

Eitt av evnunum, sum fer at fáa nógva umrøðu á ráðstevnuni er júst hetta nýggja hoyritólið Cochlear Implant. Spurningurin, ið nú verður settur er: Hvussu verður framtíðin hjá teknmáli, so hvørt sum fleiri deyv fáa sær hetta hoyritólið.

Rættiliga nógvir danir ganga við hesum hoyritólinum, eins og 11 ára gamla Bjørt Hvidbro, sum samrøða er við aðrastaðni í blaðnum

Eitt annað áhugavert evni er úrslitið av eini íslendskari kanning. Her hevur ein granskari kannað, hvussu umstøðurnar eru hjá vaksnum deyvum í einum hoyrandi samfelagi, har dentur er lagdur á teirra sosialu atferð.

Tann eina dagin verður eisini ein pallborðsfundur, har nakrir av fyrilestrahaldarunum saman við Britt Hildeng úr norska stórtinginum, Bente Dahl úr fólkatinginum, Jógvan á Lakjuni, landsstýrismanni og Heidi Petersen, løgtingslimi vera við í einum kjaki um, hvussu landsins myndugleikar skapa bestu umstøður og karmar fyri teim deyvu.

Ætlanin var eisini at fáa Hans Paula Strøm, landsstýrismann við á pallborðsfundin. Hann bar seg kortini undan, tí hann helt seg kenna ov lítið til økið, hóast økið er hansara málsøki.

Hinvegin so er eisini givin tíð til prát og samtalur. Og nógv felags áhugamál skuldu verið at práta um, tá eitt nú rektorar, sálarfrøðingar, námsfrøðingar, málvísindafólk, teknmálstulkar – og deyv, sjálvandi – hittast á sama staði.

Tilsaman vera eini 170 luttakarar á stevnuni, harav 60 teirra eru úr Føroyum.